

betri

Betri Pensjón P/F

# Hálvársfrásøgn
## 2021





# Innihaldsyvirlit


| | |
|---|---|
| 5 ára yvirlit | 4 |
| Leiðslufrágreiðing | 5 |
| Rakstrarroknskapur | 6 |
| Fíggjarstøða | 7 |
| Uppgerð av broyting í eginogn | 9 |
| Notur | 10 |
| Leiðsluátekning | 11 |
| Partafelagsupplýsingar | 12 |

# 5 ára yvirlit

| DKK 1.000 | 1H 2021 | 1H 2020 | 1H 2019 | 1H 2018 | 1H 2017 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Høvuðstøl** | | | | | |
| **Rakstur** | | | | | |
| Tryggingargjøld | 88.832 | 79.503 | 71.003 | 74.117 | 73.136 |
| Tryggingarveitingar | -19.763 | -19.084 | -16.457 | -18.347 | -15.893 |
| Úrslit av íløguvirksemi | 73.281 | -59.708 | 81.582 | 5.915 | 9.400 |
| Rakstrarkostnaðir av tryggingarvirksemi | -7.294 | -6.620 | -6.694 | -5.848 | -5.558 |
| Úrslit av endurtrygging | -513 | -321 | -360 | -311 | -257 |
| Tryggingartekniskt úrslit | 6.130 | 7.410 | 7.091 | 192 | 115 |
| Tryggingartekniskt úrslit av sjúkra- og vanlukkutr. | -653 | 1.259 | -418 | 1.429 | 351 |
| Ársúrslit | 4.026 | 4.486 | 7.463 | 2.048 | 1.798 |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Avsetingar til tryggingar- og íløguavtalur | 1.621.421 | 1.378.607 | 1.299.669 | 1.166.861 | 1.047.756 |
| Eginogn í alt | 83.596 | 79.799 | 77.636 | 70.204 | 65.662 |
| Ognir í alt | 1.711.315 | 1.465.744 | 1.388.336 | 1.241.384 | 1.117.114 |
| **Lyklatøl** | | | | | |
| Avkastpst. knýtt at marknaðarrentuproduktum [1] | 5,3% | -4,2% | 6,6% | | |
| Váði á avkasti knýtt at marknaðarrentuproduktum [1] [2] | 2 | 2 | 2 | | |
| Kostnaðir fyri hvønn tryggjaðan | 354 kr. | 343 kr. | 367 kr. | 343 kr. | 499 kr. |
| Kostnaðir í % av avsetingum | 0,5% | 0,5% | 0,5% | 0,5% | 0,8% |
| Renting av eginogn eftir skatt | 4,8% | 5,6% | 10,1% | 3,0% | 3,3% |
| Solvensdekningur | 303,3% | 288,0% | 279,3% | 252,1% | 247,8% |

## Brásjúkuvirksemi

### Høvuðstøl

| | 1H 2021 | 1H 2020 |
|---|---|---|
| Tryggingargjøld brutto | 3.457 | 3.166 |
| Bruttoskaðaendurgjøld | -3.689 | -1.431 |
| Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi | -422 | -476 |
| Úrslit av endurtrygging | 0 | 0 |
| Tryggingartekniskt úrslit | -654 | 1.259 |
| Íløguavkast eftir tryggingartekniska rentu | 0 | 0 |
| Ársúrslit | -654 | 1.259 |
| Úrslit av endurgjaldsavsetingum | 0 | 0 |

### Lyklatøl

| | 1H 2021 | 1H 2020 |
|---|---|---|
| Bruttoendurgjaldsprosent | 106,7% | 45,2% |
| Bruttokostnaðarprosent | 12,2% | 15,0% |
| Combined Ratio | 118,9% | 60,2% |

**Viðmerking:**

1) Lyklatølini eru nýggj sambært broyttu kunngerðini um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum v.m., tí eru ongi tøl fyri árini 2017 til 2018

2) Talið vísir til váðabólk, sum greitt frá í kunngerð nr. 4 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum v.m. §101 og bilag nr. 8

# Leiðslufrágreiðing

## Eigaraviðurskifti

Betri Pensjón P/F er lívstryggingar- og pensjónsfelag, ið selur pensjónsloysnir til føroyska marknaðinum.

Betri P/F er móðurfelag hjá Betri Pensjón P/F og eigur allan partapeningin í felagnum.

## Úrslitið fyri fyrra hálvár 2021

Tryggingargjøldini, íroknað innskot, vuksu frá 79,5 mió. kr. í fyrra hálvári 2020 til 88,8 mió. kr. fyrra hálvár 2021.

Avkastið fyrra hálvár 2021 var 73,3 mió. kr. móti einum halli á 59,7 mió. kr. í fyrra hálvári 2020.

Tryggingarveitingarnar vóru 20,1 mió. kr. fyrra hálvár 2021 móti 21,1 mió. kr. fyrra hálvár 2020.

Rakstrarútreiðslurnar vóru 7,3 mió. kr. ímóti 6,6 mió. kr. fyrra hálvár 2020.

Rakstrarúrslitið eftir skatt gjørdist 4,0 mió. kr. móti 4,5 mió. kr. í fyrra hálvári 2020.

Úrslitið fyri tíðarskeiðið verður mett nøktandi.

## Viðmerkingar til fíggjarstøðuna

Fíggjarstøðan hjá Betri Pensjón øktist frá 1.588,2 mió. kr. til 1.711,3 mió. kr. í fyrra hálvári 2021. Lívstryggingaravsetingar øktust frá 1.492,9 mió. kr. til 1.621,4 mió. kr.

Eginognin tann 30. juni 2021 var 83,6 mió. kr.

## Váðar, ið kunnu ávirka úrslitið

Betri Pensjón metir váða at fevna um øll viðurskifti, ið kunnu hava negativa ávirkan á møguleikar felagsins at røkka síni handilsligu mál. Felagið nýtir væl skipaðar mannagongdir fyri at stýra váðanum. Eisini hevur nevndin ásett umfatandi, yvirskipaðar leiðreglur, sum stjórn og leiðsla alsamt halda eyga við verða hildnar.

Marknaðarváðin er váðin fyri, at dagsvirði á ognum felagsins broytast orsakað av broyttum marknaðarviðurskiftum so sum rentu, kursi v.m. Fyri Betri Pensjón er marknaðarváðin størsti fíggjarligi váðin. Hesin váði verður avmarkaður við at tryggja hóskandi karmar fyri rentuváða fyri lánsbrøv, saman við eini varisligari íløguætlan fyri partabrøv. Felagið avmarkar eisini marknaðarváðan við at grunda virksemi sítt á Unit Link tryggingar, har kundarnir bera allan íløguváðan av egnum íløgum. Marknaðarváðin er undir neyvum eftirliti.

Tryggingarligu váðanir eru knýttir at gongdini í deyðstíttleika, avlamistíttleika v.m. Hækkandi livialdur økir veitingar felagsins til eftirlønir, meðan tal av andlátum og sjúkrameldingum ávirka veitingar í sambandi við deyða og sjúku. Av tí at felagið í høvuðsheitum hevur lagt seg eftir Unit Link tryggingum, har eftirlønin hjá kundanum er knýtt at teirri íløgustrategi, hann sjálvur hevur valt, eru tryggingarligu váðarnir avmarkaðir.

Felagið kann vera fyri fíggjarligum tapi vegna operationellan váða. Hesin kann eisini skaða umdømi felagsins. Operationellir váðar fevna um váða fyri tapi vegna feil í KT-skipanum, løgfrøðiligum ósemjum, ikki nøktandi ella skeivum mannagongdum ella sviki.

Felagið avmarkar operationellan váða við innaneftirliti og funktiónsskilnaði. Hetta verður alsamt endurskoðað og dagført. Fyri at tryggja, at prísir og tænastustøði eru kappingarfør, fylgir felagið neyvt við marknaðargongdini. Stórur dentur verður lagdur á góða kundatænastu, opinleika og gjøgnumskygni í samskiftinum við kundan.

## Kapitalur og solvensur

Eginogn felagsins tann 30. juni 2021 var 83,6 mió. kr. ímóti 83,8 mió. kr. tann 31. desember 2020.

Fæfeingiskravið var 27,5 mió. kr. tann 30. juni 2021.

Grundarfæfeingið við hálvárið 2021 var 83,5 mió. kr., og solvensdekningur felagsins var 303,3% ella 56,0 mió.kr. oman fyri fæfeingiskravið.

## Útlit fyri 2021

Við árslok 2020 varð mett, at raksturin fyri 2021 fór at geva eitt avlop millum 3,0 og 6,0 mió.kr. Gongdin í fyrra hálvári hevur verið betri enn væntað orsakað av góðum váðaúrsliti. Hóast fyrra hálvár gjørdist betri enn væntað, væntast raksturin fyri árið 2021 tó at verða á støði við metingina við ársbyrjan.

## Serligar hendingar

Frá degnum fyri fíggjarstøðuna til í dag eru ongar týðandi hendingar farnar fram, sum ávirka metingina av hálvársfrásøgnini fyri 2021.

| Nota | DKK 1.000 | 1H 2021 | 1H 2020 |
|---|---|---|---|
| | **Rakstrarroknskapur** | | |
| | **Tryggingargjøld** | | |
| | Tryggingargjøld brutto | 88.832 | 79.503 |
| | Endurtryggingargjøld | -513 | -321 |
| | **Tryggingargjøld** | **88.319** | **79.182** |
| | **Íløguvirksemi** | | |
| | Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m. | 11.973 | 9.043 |
| | Virðisjavningar | 63.039 | -66.877 |
| | Fyrisitingarkostnaðir av íløguvirksemi | -1.730 | -1.874 |
| | **Úrslit av íløguvirksemi í alt** | **73.281** | **-59.708** |
| | **Tryggingarveitingar fyri egna rokning** | | |
| | Útgoldnar veitingar | -20.084 | -21.139 |
| | **Tryggingarveitingar fyri egna rokning í alt** | **-20.084** | **-21.139** |
| | **Broyting í lívstryggingaravsetingum fyri egna rokning í alt** | | |
| | Broyting í lívstryggingaravsetingum | -128.826 | 12.354 |
| | **Broyting í lívstryggingaravsetingum fyri egna rokning í alt** | **-128.826** | **12.354** |
| | **Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi fyri egna rokning** | | |
| | Útveganarkostnaður | -2.957 | -2.789 |
| | Fyristingarkostnaður | -4.336 | -3.831 |
| | **Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi fyri egna rokning í alt** | **-7.294** | **-6.620** |
| | Flutt úrslit av íløguvirksemi | 734 | 3.340 |
| | **Tryggingartekniskt úrslit** | **6.130** | **7.410** |
| | Tryggingartekniskt úrslit av sjúkra- og vanlukkutryggingarvirksemi | -653 | 1.259 |
| | Íløguúrslit av eginognini | -734 | -3.340 |
| | **Úrslit áðrenn skatt** | **4.743** | **5.329** |
| | **Skattur** | **-716** | **-843** |
| | **Úrslit** | **4.026** | **4.486** |

| Nota | DKK 1.000 | 30.06.2021 | 31.12.2020 |
|---|---|---|---|

# Fíggjarstøða

## Ogn

| Nota | DKK 1.000 | 30.06.2021 | 31.12.2020 |
|---|---|---|---|
| | **Immateriell ogn** | **0** | **0** |
| | **Materiell ogn** | | |
| | Rakstrargøgn | 0 | 0 |
| | **Materiell ogn í alt** | **0** | **0** |
| | **Aðrar fíggjarligar íløguognir** | | |
| | Íløguprógv | 73.279 | 65.603 |
| | Innlán í kreditfeløgum | 18.596 | 25.687 |
| | **Aðrar fíggjarligar íløguognir í alt** | **91.875** | **91.290** |
| | **Íløguogn í alt** | **91.875** | **91.290** |
| | **Íløguogn tengd at marknaðarrentuproduktum** | **1.612.147** | **1.483.180** |
| | **Áogn** | | |
| | **Áogn í sambandi við beinleiðis tryggingaravtalur** | | |
| | Áogn hjá tryggingartakarum | 4.890 | 5.547 |
| | **Áogn í sambandi við beinleiðis tryggingaravtalur í alt** | **4.890** | **5.547** |
| | Áogn hjá atknyttum virkjum | 0 | 465 |
| | Onnur áogn | 250 | 5.599 |
| | **Áogn í alt** | **5.140** | **11.611** |
| | **Onnur ogn** | | |
| | Útsett skattaogn | 86 | 384 |
| | **Onnur ogn í alt** | **86** | **384** |
| | **Tíðaravmarkingar** | | |
| | Rentur tilgóðar og innvunnin leiga | 1 | 32 |
| | Aðrar tíðaravmarkingar | 2.067 | 1.704 |
| | **Tíðaravmarkingar í alt** | **2.067** | **1.735** |
| | **OGN Í ALT** | **1.711.315** | **1.588.200** |

| Nota | DKK 1.000 | 30.06.2021 | 31.12.2020 |
|---|---|---|---|
| | **Fíggjarstøða** | | |
| | **Skyldur** | | |
| | **Eginogn** | | |
| | Partapeningur | 70.000 | 70.000 |
| | Yvirkursur við partabrævaútgávu | 25.700 | 25.700 |
| | Framflutt úrslit | -12.104 | -16.130 |
| | Uppskot til vinningsbýti | 0 | 4.200 |
| | **Eginogn í alt** | **83.596** | **83.770** |
| | **Avsetingar til tryggingar- og íløguavtalur** | | |
| | Lívstryggingaravsetingar | 1.620.921 | 1.492.095 |
| | Avsett til endurgjøld | 500 | 850 |
| | **Avsetingar til tryggingar- og íløguavtalur í alt** | **1.621.421** | **1.492.945** |
| | **Skuld** | | |
| | Skuld í samband við beinleiðis trygging | 1.283 | 267 |
| | Skuld til atknýtt virkir | 13 | 200 |
| | Beinleiðis skattur | 714 | 1.726 |
| | Onnur skuld | 2.118 | 7.747 |
| | **Skuld í alt** | **4.127** | **9.939** |
| | **Tíðaravmarkingar** | **2.170** | **1.547** |
| | **SKYLDUR Í ALT** | **1.711.315** | **1.588.200** |

1 Nýttur roknskaparháttur

# Uppgerð av broyting í eginogn

| DKK 1.000 | Partapeningur | Yvirkursgrunnur | Flutt úrslit | Uppskot til vinningsbýti | Eginogn |
|---|---|---|---|---|---|
| **Eginogn 1. januar 2020** | **70.000** | **29.900** | **-24.587** | **5.100** | **80.413** |
| **Rørslur á eginognini í 2020** | | | | | |
| Ársúrslit | | -4.200 | 8.457 | 4.200 | 8.457 |
| Útgoldið vinningsbýti fyri 2019 | | | | -5.100 | -5.100 |
| **Eginogn 31. desember 2020** | **70.000** | **25.700** | **-16.130** | **4.200** | **83.770** |
| | | | | | |
| **Eginogn 1. januar 2021** | **70.000** | **25.700** | **-16.130** | **4.200** | **83.770** |
| **Rørslur á eginognini í 2021** | | | | | |
| Úrslit | | | 4.026 | | 4.026 |
| Útgoldið vinningsbýti fyri 2020 | | | | -4.200 | -4.200 |
| **Eginogn 30. juni 2021** | **70.000** | **25.700** | **-12.104** | **0** | **83.596** |

# Notur

**Nota** **DKK 1.000**

**1** **Nýttur roknskaparháttur**

## Alment

Hálvársfrásøgnin er gjørd sambært Løgtingslóg um tryggingarvirksemi og tilhoyrandi kunngerð um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og tryggingarhaldfelagsskapum.

Nýttur roknskaparháttur er óbroyttur í mun til ársfrásøgnina fyri 2020, og verður tí víst til hesa.

Hálvársfrásøgnin er ikki grannskoðað ella gjøgnumgingin.

### Avrunding av upphæddum

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundað til heil tøl. Av tí at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og samløguna av teimum einstøku tølunum.

### Um innroknan og virðisáseting í ársfrásøgnini

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið fær framtíðar fíggjarligar ágóðar, og virði á ognunum kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og støddin á skyldunum kunnu gerast upp álítandi.

Inntøkur verða innroknaðar í rakstrarroknskapin so hvørt, tær verða vunnar, eisini virðisjavningar av fíggjarligari ogn og skuld. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis innroknaðar allar útreiðslur – herímillum tryggingarveitingar og broyting í avsetingum – sum eru við til at røkka ársins inntøku.

### Konsernviðurskifti og nærstandandi partar

Handil og tænastur millum feløg í samtakinum verða avgreidd til marknaðarprís ella á útreiðslunøktandi støði.

### Roknskaparligar metingar

Roknskaparliga virði á ávísum ognum og skyldum er tengt at metingum, hvussu hesar ognir og skyldur verða ávirkaðar av framtíðar hendingum.

### Umrokning av útlendskum gjaldoyra og kurstryggjan

Ársfrásøgnin er í donskum krónum. Upphæddir í útlendskum gjaldoyra verða umroknaðar til danskar krónur við gjaldoyrakursinum umrokningardagin.

Áogn, skuld og aðrar peningaligar upphæddir í útlendskum gjaldoyra verða umroknað til danskar krónur við gjaldoyrakursinum á degnum fyri fíggjarstøðuni. Staðfestur og ikki staðfestur vinningur ella tap av umrokning av útlendskum gjaldoyra verður innroknað í rakstrarroknskapin undir íløguvirksemi.

### Rakstrarúrslit

Felagið hevur býtt rakstrarúrslitið fyri hálvárið 2021 eftir íkastmeginregluni, sum í stuttum merkir, at tey, ið eru við til at skapa úrslitið, fáa sín lut í hesum.

### Lyklatøl

Hesi eru útroknað sambært ásetingum í kunngerð nr. 4.

# Leiðsluátekning

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og góðkent hálvársfrásøgnina fyri 2021 hjá Betri Pensjón P/F.

Hálvársfrásøgnin er greidd úr hondum í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi.

Vit meta, at nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi, soleiðis at hálvársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av ognum og skyldum felagsins, fíggjarligu støðuni pr. 30. juni 2021, umframt av úrslitinum av virksemi felagsins fyri tíðarskeiðið 1. januar 2021 - 30. juni 2021.

## Stjórn

**Betri Pensjón P/F**

Tórshavn, hin 22. september 2021

**Helgi L Petersen**
Stjóri

## Nevnd

**Bogi P. Nielsen**
Formaður

**Evy J. Jacobsen**
Næstforkvinna

**Petur Elias Nielsen**

**Jacob Eli S. Olsen**

# Partafelagsupplýsingar

### Felagið

Betri Pensjón P/F

| | |
|---|---|
| Skrás. nr.: | P/F 4627 |
| Roknskaparár: | 15 |
| Heimstaður: | Tórshavn |

### Nevnd

Bogi P. Nielsen, formaður
Evy J. Jacobsen, næstforkvinna
Petur Elias Nielsen
Jacob Eli S.Olsen

### Stjórn

Helgi L. Petersen, stjóri

### Grannskoðan

Januar løggilt grannskoðanarvirki P/F
PricewaterhouseCoopers Statsautoriseret Revisionspartnerselskab
Innanhýsis grannskoðan í Betri samtakinum.

**Betri Pensjón P/F**
Kongabrúgvin
Postsmoga 329
110 Tórshavn

Tel +298 348 700
pensjon@betri.fo
www.betri.fo